



# Shell sóknast eftir vælsmurdum seljara

Sum liður í miðvísa arbeiði okkara at hava framhaldandi vøkstur og at varðveita støðuna sum leiðandi brennioljuveitari á føroyska marknaðinum, sóknast Shell eftir dugnaligum sølufólki.

**Starvið**
Talan er um álitiskrevjandi og sjálvstøðugt starv, ið krevur grundleggjandi tekniskan kunnleika. Vit veita góða, fakliga upplæring og geva tær eitt trygt og professionelt bakland í sølutoymi okkara. Tú fært um hendi alla smyrjiolju og alla uttanlandssølu hjá Føroya Shell og fært serliga við skip at gera. Harumframt verður tú við í vanligum søluuppgávum.

**Tínir førleikar**
Tú hevur fyrst og fremst góðan handilssans og søluroyndir. Tú ert sjálvandi ágrýtin og álítandi, arbeiðir sjálvstøðugt eins væl og í toymi og kanst arbeiða skiftandi tíðir og støð. Vit vænta, at tú hevur innlit í shipping og logistikk, og fram um alt ert tú eitt álitisvekjandi sølufólk. Málsliga ert tú væl fyri, bæði í skrift og talu – og enskt er eingin vansi hjá tær heldur.

**Útbúgving**
Tú ert møguliga útbúgvin maskinmeistari ella verkfrøðingur og hevur helst eisini nomið tær handilsligan kunnleika.

**Lønarviðurskifti**
Lønin er góð, og greið pensiónsviðurskifti fylgja við starvinum. Tú fært frían bil.

**Umsóknir**
Umsóknir og CV skulu vera Føroya Shell í hendi í seinasta lagi 5. mars 2007. Starvið verður sett sum skjótast.

**Vilt tú hava meiri at vita?**
So ert tú vælkomin at seta teg í samband við Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara, erling@shell.fo, tlf. 34 74 00, ella Hákun Djurhuus, stjóra, hakun@shell.fo.

**Um Føroya Shell**
Føroya Shell er partur av Shell Bólkinum og virkar sum sjálvstøðugt felag eins og Shell-fyritøkur í øðrum londum.

Starvsfólk hjá Shell arbeiða eftir felags kjarnuvirðum, sum eru trúfesti, reinlyndi og virðing fyri medmenniskjum, eins og vit eru fullgreið um týdningin av áliti, opinleika, toymisarbeiði og professionalismu.

Sum fyritøka virkar Shell fyri burðardyggari og varandi menning og byggir avgerðir sínar á fíggjarlig, umhvørvislig og samfelagslig fyrilit.


